

# MYNDAKAPPING
## Ársins summarmynd 2001

3-arin skipar saman við Atlantic Airways og Sosialinum fyri stórari myndakapping um at finna ársins summarmynd 2001.

Finn tína bestu summarmynd og lat hana inn í 3-aranum ella send hana við postinum.

Vit fara í komandi mikudags-Sosialum at vísa nakrar av innkomnu myndunum.



Vørdis heintar sandblómur á sandinum
Sent hevur:
Anja Sandoy
Treðardalur
Sandur



Tveir raskir dreingir uppi á Skælingsfjalli
Sent hevur:
Tordis D. Eiriksfoss
Mækjugøta 7
Tórshavn

Í oktober verður avdúkað á framsýning á torginum í SMS, hvør eigur ársins summar-mynd. Eisini fáa nr. 2 og 3 ein vinning.

**1. VINNINGUR:**
Vikuskiftisferð fyri 2 til Keypmannahavn, við hoteluppihaldi frá Atlantic Airways,



**2. VINNINGUR:**
Minolta digitalt myndatól. Dimage 201, virði 4.995,-







Sent hevur:
Ása Poulsen
Sjúrugøta 7
Tórshavn

Sent hevur:
Bogi Johannesen
Suðurstíggjur 12
Argir

**3. VINNINGUR:**
Minolta Autofokus myndatól. 150AF. Ársins kamera.





Grind í Fámjin
Sent hevur:
Palli Jacobsen
Vágur



Sent hevur:
Birgith Sørensen
Tvøroyri

**Seinasta freist at lata myndir inn er:**
**LEYGARDAGIN 13. OKTOBER**

BARA 1 MYND Í HVØNN BJÁLVA!!

Kom inn í 3-aran við myndini og hesum lepanum ella send hana við postinum.

Sent hevur, navn:
Bústaður:
Postnr.: Bygd/býur:
Møg. myndatekstur:

☐ Eg vil fegin hava myndina aftur, og havi tí viðlagt ein frímerktan brævbjálva

Send myndina, hendan lepan og frímerkta brævbjálvan til: **3-arin, postboks 1057, FO-110 Tórshavn**

ATLANTIC AIRWAYS
Sosialurin
3-arin



# 85 føroyingar til Svøríkis á ferðslutrygdarskeið

**Fullsett flogfar hjá Atlantsflog fór í gjáramorgunin til Trollhätten í Svøríki við 85 føroyingum, sum har skulu síggja 0-hugsjónina – dygga svenska ferðslutrygdararbeiðið – í verki**

FERÐSLYTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

– Eingin dripin og eingin álvarsliga skaddur í ferðsluni.

Hetta er aðalmálið í 0-hugsjónini – hugsjónini, ið Ferðslytrygd roynir at vinna ljóð fyri í Føroyum.

Í 0-hugsjónini verður ásannað, at vit sleppa ongantíð heilt undan, at menniskju gera mistøk – hóast ferðsluútbúgvingin alsamt verður betrað. Tí má samfelagið gera viðurskiftini í ferðsluni so trygg, at menniskjalig mistøk ikki verða revsað við deyða ella lívlongum avlamni.

Av tí at tað í ár vóru 25 ár síðani, at Ráðið fyri Ferðslutrygd varð sett á stovn, gjørdi starvsnevndin av at gera okkurt serligt átak, ferðsluni at frama. Sum ein liður í hesum hevur Ferðslutrygd skipað fyri eini kunningarferð til Trollhättan í Svøríki.



*Endamálið hjá Ferðslutrygd er stutt og greitt at fáa landsins evstu myndugleikar at samtykkja ein langtíðar ferðslutrygdarpolitikk, sum er grundaður á Null-hugsjónina. Tað merkir, at eingin skal lata lív í ferðsluni*

Í gjáramorgunin fór fullsett flogfar hjá Atlatnsflog avstað við løgtingsmonnum, kommunalpolitikarum, fólki í kommunalu umsitingini, fólki frá Landsverksfrøðinginum, umboðum fyri Vinnumálsatýrið, Bileftirlitið, løgregluna, koyrilærarar, Strandferðsluna, tryggingarfeløg, bilasølufólki o. ø. sum hava við ferðsluna at gera – og um boðum fyri fjølmiðlarnar. Luttakararnir komu aftur til landið í gjárkvøldið.

Endamálið hjá Ferðslutrygd er stutt og greitt at fáa landsins evstu myndugleikar at samtykkja ein langtíðar ferðslutrygdarpolitikk, sum er grundaður á Null-hugsjónina.

### Kendur fyri trygdararbeiði

Í Trollhättan, sum er kendur fyri stóru slúsurnar, sum føra niðan til Väneren, størsta vatnið í Svøríki, fyri Saab-verksmiðjuna og fyri filmsvirksemi, skuldu føroyingarnir síggja – og royna at koyra á – eini serligari breyt, sum er gjørd fyri at vísa, hvussu til ber at betra um ferðslutrygdina.

Seinastu tvey árini er býurin Trollhättan vorðin kendur í sambandi við ferðslutrygdararbeiði. Tað kemst av, at í einuim býarpart er sett í verk eitt royndartiltak, nevnt »Demoslingen«, ella »Nollvisiondslingen«. Hetta er liður í arbeiðinum at fremja Null-hugsjónina, sum svenski Ríkisdagurin hevur samtykt at seta í vert. Har eru meira enn 100 milliónir svenskar krónur nýttar at broyta eitt 40 km langt vegastrekki soleiðis, at tað verður so trygt, sum til ber. Har eru rundkoyringar, ymisk sløg av ferðtálmum, tað veri seg bungur, trongar, ymiskt vegtilfar, t. d. brúgvasteinar í ymiskum litum o. s. fr.

Tað sum serliga hevur vakt ans er, at vitjandi fáa høvi at koyra ígjøgnum hetta økið við serútgjørdum bilum. Teir eru m. a. útgjørdir við mátara, sum við signalum frá sendarum í vegnum kunnu boða bilføraranum frá, hvussu skjótt tað er loyvt at koyra í einum ávísum øki. Mátararnir hava harumframt samband við seerliga skipan í spitaranum, sum ger, at fert tú upp um loyvda ferðmarkið, verður spitarin trekur, og tú verður noyddur at trýsta serliga hart á hann fyri at seta meiri ferð á.

Royndartiltakið í Trollhättan hevur til endam áls at geva fólki høvi í verki at gera sínar egnu metingar um arbeiðið við Null-hugsjónini.

## Skulu vit góðtaka ferðsludeyðan?

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

Higartil eru 230 fólk deyð í ferðsluni í Føroyum. Fyrsta ferðsluvanlukkan, ið kravdi mannalív, hendi á Varmakeldueiði 2. september í 1928. Tá fór ein lastbilur við trimum monnum út av vegnum, og førarin doyði.

At hava eina null-hugsjón – at eingin skal doyggja ella koma illa til skaða í ferðsluni – er eitt sera høgt mál at seta sær, og mangan verður spurningurin settur, um til ber at røkka hesum høga máli

Men hinvegin kunnu vit seta spurningin:

– Hvør skal tann næsti verða, sum doyr í ferðsluni? Skal tað vera eg? Ella tú? Ella onkur annar…???

# Føroyar eftirbátur á ferðslutrygdarøkinum

**Føroyar er einasta Norðurland, sum als ongan ferðslutrygdarpolitikk hevur**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*

– Vit vóru so bláoygd at halda, at Føroyar kundu gerast fyrsta landið aftan á Svøríki í 1995 at samtykkja ein ferðslutrygdarpolitikk, sum byggir á Null-hugsjónina. Men vit mugu við skomm ásanna, at Føroyar í dag er einasta Norðurlandið, sum als ongan ferðslutrygdarpolitikk hevur, sigur Petur Jákup Sigvardsen, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Petur Jákup Sigvardsen sigur, at besta gávan, sum Ferðslutrygd kann fáa í 25 ára føðingardagsgávu, hevði verið, at Føroya Løgting samtykti ein ferðslutrygdarpolitikk, so vit á ferðslutrygdarøkinum høvdu okkurt at hildið okkum til. Hann vísir á, at ferðsluvanlukkurnar eru ein stórur fólkaheilsutrupulleiki.

– Á hvørjum øðrum fólkaheilsuøki høvdu vit bara latið staðið til? Hví góðtaka vit, at so nógv fólk – oftast ung fólk – á hvørjum ári skulu doyggja ella gerast álvarsliga sjúk av ferðsluvanlukkum? spyr formaðurin í stýrinum fyri Ferðslutrygd.

### Lægri ferð

Málsetningurin í Nullhugsjónini er, at eingin skal lata lív, og eingin skal fáa álvarsligan skaða av ferðsluvanlukkum, og at ferðslan og ferðsluumhvørvið skal verða lagað eftir hesum málsetningi.

Vit mugu alsamt betra um ferðsluumhvørvið, so at menniskjalig mistøk ikki enda við vanlukku, har onkur má lata lív ella koma álvarsliga til skaða.



*– Vit mugu við skomm ásanna, at Føroyar í dag er einasta Norðurlandið, sum als ongan ferðslutrygdarpolitikk hevur, sigur Petur Jákup Sigvardsen, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

Ein av aðaltáttunum í Null-hugsjónini er, at 30 km/t verður sett sum alment galdandi ferðmark í øllum økjum, har tað ikki ber til at skilja fólk til gongu og á súkklu burtur frá bilferðslu

Sambært Null-hugsjónini eru tað teir álvarsligu fólkaskaðarnir, sum skulu fáast burtur. Harvið verður ikki sagt, at tað ber til at sleppa undan øllum óhappum og øllum vanlukkum. Siðfrøðisliga útgangsstøðið er, at tey mistøk sum vit menniskju gera, og altíð koma at gera í ferðsluni, ikki skulu føra við sær, at onkur má lata lív ella koma álvarsliga til skaða.

Ferðsluumhvørvið má verða soleiðis skipað, at menniskjanslig mistøk ikki enda við vanlukku.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í fleiri ár í talu og skrift og á annan hátt roynt at fáa landsins evstu myndugleikar at samtykkja ein langtíðar ferðslutrygdarpolitikk, sum er grundaður á hugsanirnar í Null-hugsjónini, og er skeiði í Trollhättan í gjár ein liður í hesum upplýsingararbeiði.